# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo**

# Teinurin er bara 900 metrar

***Kapproður:** Fimtan bátar kunnu rógva í senn, og tað er júst bátatalið í størstu kappingini, sum verður millum gentumanningarnar*

Hvussu langur er teinurin, sum verður rógvin á ólavsøku. Ofta hevur hesin spurningurin verið frammi, og svarini hava verið alla staðni millum 930 og 970 metrar. Eftir vestanstevnuna helt Bárður Nielsen, formaður í róðrardeildini hjá VÍF, at tíðirnar á ólavsøku vóru so mikið góðar, tá sammett verður við hinar kappingarnar á eitt túsund metrum, at málið í Havnii so langt í frá kann vera eitt túsund metrar.

Tá viðmerktu vit, at vit skuldu venda aftur til henda spurningin undan ólavsøkuni. Nú eru allar venjingar undan róðrinum, sum verður í dag, loknar, og vit hava spurt tveir av teimum, sum eru við í spennandi kappingum um FM, hvussu langan róðrartein teir rokna við at kappast á í dag.

– Hann er í hvussu so er ikki eitt túsnd metrar. Vit gera róðrarteinin upp í tøkum og ikki í metrum. Í Vestmanna tóku vit 180 tøk á túsund metrum, og har er málið kanska í so stutt. Vanliga rokna vit 190 tøk til eitt túsund metrar. Tá vit venja her á Strondum, rógva vit 205 tøk.

Hetta sigur Hilmar Joensen, sum er róðursmaður og bátsformaður umborð á Stráluni. Teir kappast um FM heitið.

Men hvussu nógvir metrar heldur tú, at tað eru av Argjahøvda og inn undir Skipafelagið?

– Eg veit ikki rættuliga, men plaga teir ikki at siga, at tað eru umleið 960 metrar?

– Men, sum sagt, tað eru ikki metrarnir, sum tað snýr seg um, men tøkini. Vit vóru í Havnini mánakvøldið eftir vestanstevnuna. Tá ítaðu vit róðrarøkið av og taldu tøkini. So vit halda okkum vera væl fyri, sjálvt um metrarnir ikki eru akkurát so nógvir ella fáir, sum vit høvdu roknað við, heldur formaðurin umborð á Stráluni.

Vit seta bátsformanninum á Vestmenninginum sama spurningin?

Hvussu langur er róðrarteinurin á ólavsøku?

Jan Johannesen hevur ofta róð á ólavsøku, men hann vil ikki seta metrar á:

– Tíðirnar vísa, at málið er væl styttri, enn tað er aðra staðni. Eg dugi ikki at ætla, men kanska einar 930 metrar ella har á leið.

Hava tit undan ólavsøkuni verið og vant málið?

– Nei, vit hava hildið okkum her norðuri í Vestmanna. Vit hava róð so ofta á ólavsøku, at vit halda okkum kenna málið heilt væl.

### Neyva málið

Í Róðrarsambandinum vita teir heilt neyvt, hvussu long málini eru. Tá vit spyrja formannin, Hannis Joensen, hvussu langur róðrarteinurin á ólavsøku er, slær hann upp og svarar, at sambært uppmátingini, sum Matrikulstovan gjørdi í fjør, so er róðrarteinurin frá Argjahøvda og inn undir Skipafelagið 901,31 metrar.



*So er tað greitt. Málið á ólavsøku er 901 metrar og 31 sentimetrar*

Hvat siga tit til tað, spyrja vit formannin á Stráluni og Vestmenninginum.

– Nei, vit høvdu ikki roknað við, at tað var so nógv styttri, enn tað er á øðrum so kallaðum túsund metra teinum, svara báðir, og so mugu vit fyri teirra viðkomandi og fyri øll hini róðrarfólkini vóna, at tað eru tøkini og ikki metrarnir, sum taktikkurin verður lagdur út frá.

### Trongligt

Í Róðrarsambandinum vóru teir annars rættuliga spentir upp á, hvussu stór luttøkan fór at vera í størstu kappingini á ólavsøku. Um hon hevði farið upp um fimtan bátar, so hevði verið neyðugt við innleiðandi umførum:

– Størsti róåðurin verður í kappingini millum gentubátar. Har verða fimtan bátar við í kappingini. Tá verður roknað við fimtan metra vídd til hvønn bátin, og har afturat eru seks metrar hvørju megin samlaða róðrarøkið. Tað vil siga, at um bátarnir halda seg har, sum teir eiga at vera, so verður nóg mikið av plássi, men talan er avgjørt ikki um nógv avlopspláss í kappingini millum genutbátarnar, staðfestir Hannis Joensen.

JH

# Jens Skipagøta til Kyndil

*Landsliðsmálverjin, sum í fjør vardi málið hjá hoyvíkingum, skal spæla við Kyndli, meðan tað er óvist, um Jakob Jónsson skal verða leikandi venjarin hjá Tjaldri*

STEFAN Í SKORINI

H71 hevði eitt sera vánaligt kappingarár í fjør, og liðið úr Hoyvík var millum tey aftastu liðini í 1. deild.

Hetta fær nú avleiðingar, tí at teir bestu leikararnir hava ikki hug at spæla fyri eitt botnlið. Jens Skipagøta er millum teir bestu málverjarnar í Føroyum, og hann spældi eisini á landsliðnum, tá ið Grønland var á vitjan her.

Kyndli vantar ein málverja, og tí vendu teir sær til Jens Skipagøta, um hann hevði hug at spæla fyri Kyndil, og hesum hevur málverjin játtað fyri.

Jens Skipagøta sigur, at hann hevur ikki skift felag enn, men at tað liggur fast, at hann verjir málið hjá Kyndli næsta kappingarár. Eingin sáttmáli er undirskrivaður millum Kyndil og Jens Skipagøta, og tað er heldur ikki greitt, um hann fær nakra samsýning fyri at skifta til Kyndil.

Við hesum brynjar Kyndil seg til næsta kappingarár. Seinast gekst ikki serliga væl hjá Kyndli í landskappingini, tá teir endaðu á fjórða plássi aftanfyri Neistan, Kyndil og StÍF, men teir sigraðu tó í steypakappingini. Í ár er ætlanin, at Kyndil skal blanda seg í stríðið um meistaraheitið, og tí hava teir nú fingið nýggjan málverja. Kyndil missir tó møguliga ein av høvuðsstuðlunum frá seinast.

### Óvist við Jacob Jónsson

Jakob Jónsson var leikandi venjarin hjá Kyndli fyri tveimum árum síðani, meðan hann í fjør var vanligur spælari. Hann hevur nú skrivað undir sáttmála við Tjaldur, har hann skal verða leikandi venjari hjá 1. deildar liðnum.

Sáttmálin varð undirskrivaður fyri meira enn tveimum mánaðum síðani, men Jakob Jónsson sigur seg einki hava hoyrt aftur frá Tjaldri, síðani sáttmálin varð undirskrivaður. Tí er hann eitt sindur í iva, um hann skal verða venjari har, ella um hann skal halda fram við at spæla við Kyndli.

Formaðurin í Tjaldri, Andrias Jacobsen, sigur harafturímóti, at alt er komið uppá pláss, og at Jakob Jónsson næsta kappingarár verður leikandi venjari hjá Tjaldri. Ætlanin er at fara í gongd við venjingina í august, men alt er tengt at fótbóltinum, tí at flestu leikararnir spæla fótbólt sum summarið.

Liðið hjá Tjaldri fær styrk úr Íslandi, haðani Jens Martin Knudsen kemur, um hann ikki verður útleigaður av Leiftri, eftir at landskappingin í Íslandi endar. Eisini ætlar Kári Jacobsen, sum hevur verið hondbóltsdómari, at spæla hondbólt aftur næsta kappingarár.

# Julian millum málskjúttarnar

*Sogndal lyfti seg upp á triðja plássið, tá teir tríggir føroyingarnir vóru við til at smyrja Byåsen av*

Mikukvøldið var eitt fínt kvøld í Sogndal í Noregi. Tey 738, sum vóru og hugdu at fótbólti, nýttu góða summarveðrið og frøddust um, at tað eftir vónbrotið sunnudagin hesa ferð eydnaðist heimaliðnum at vinna stórsigur.

Botnliðið By´sen varð sent til hús við 6–1 tapi. Við sigrinum tók Sogndal seg upp á triðja plássið, og teir tosa framvegis um, at tað skal bera teimum til at vera við í kappingini um uppflyting.

Sogndal hevði greiða yvirvág alla tíðina, men teir á heimaliðnum vóru kløkkaðir, áðrenn teir kundu njóta sigurin. Í fyrsta skjótálopinum løgdu gestirnir seg á odda. Tá vóru bara fimm minuttir farnir. Heimaliðið javnaði, tá eitt korter var farið, og so var tað bara ein spurningur um tíð, nær teir fóru at leggja seg á odda. Tað gjørdu teir, tá hálvur tími var farin, og so var tað bara ein spurningur, hvussu stórur sigurin fór at verða.

Allir tríggir føroyingarnir vóru millum teir fyrstu ellivu. Hans Fróði Hansen og hinir í verjuni høvdu ikki nógv at gera, tí tað mesta gekk fyri seg á hinari hálvuni.

Julian Johnsson og Kurt Mørkøre høvdu fleiri roynndir móti málinum, men hesa ferð eydnaðist tað ikki Kong Kurt, sum teir í Sogndal kalla Kurt Mørkøre, at skora. Næst við var hann, tá hann tíðliga í 1. hálvleiki eftir horna sendi í stólpan. Í 2. hálvleiki hevði hann onkran góðan møguleika, men tað eydnaðist ikki at skora.

Julian Johnsson hevði fleiri skotroyndir, og tað eydnaðist honum at skora eitt mál. Tá hálvur tími var farin legði hann Sogndal framum 2–1. Málið trýsti hann í kassan eftir eitt langt innkast, sum var snittað innfyri málið.

Ólavsøkuna fara teir tríggir føroyingarnir í Sogndal at brúka at fyrireika seg til næsta útidystin. Hann verður sunnudagin móti Skeid. Hetta liðið er fimti niðast. Øll liðini í næstbestu deildini hava nú spælt fimtan dystir. Sogndal hevur á triðja plássinum 26 stig.

JH



# Strálan hevur ongantíð vunnið á ólavsøku

***Kapproður:** Sera stórur spenningur er um úrslitini í kappingunum millum 6–mannaførini við monnum og 10–mannaførini*



*UM tað endiliga eydnast Stráluni at vinna ein ólavsøkuróður, gerast teir samstundis føroyameistarar*

Seinnapartin í dag verður punktum sett fyri einum higartil væl eydnaðum róðrarári. Spenningurin hevur ikki verið stórur í kappingunum hjá 5–mannaførum við dreingjum og gentum. Har hava ávikavíst Tjaldrið og Frúgvin verið einaráðandi, og tað sama hevur verið galdandi í kappingunum millum 6–mannaførini við kvinnum og 8–mannaførini. Har hava ávikavíst Jarnbardur og Argjabáturin verið púra suverenir. Eingin orsøk er seinnapartin í dag at rokna við øðrum vinnarum enn hesum fýra.

Harafturímóti er spenningurin sera stórur millum 6–mannaførini við monnum og 10–mannaførini.

### Ongantíð vunnið

Strálan av Strondum má metast at vera favorittur í kappingini millum 6–mannaførini, men teir hava ikki hagtølini við sær. Strálan við monnum hevur ongantíð vunnið á ólavsøku. Teir vunnu FM í 1991 og í 1992, men tá vóru teir báðu ferðirnar næstfremstir á ólavsøku:

– Kappingin higartil í ár hevur víst, at tað eru fýra bátar, sum mugu metast at hava møguleika at vinna. Hvessingur og vit hava vunnið róðrarnar higartil, men Gongurólvur hevur verið væl við, og Hósvíkingur skal ikki avskrivast, heldur Hilmar Joensen, bátsformaður á Stráluni.

Strálan hevur róð væl, men teir hava havt trupulleikar av startinum í øllum kappingunum:

– Síðani á vestanstevnuni hava vit vant startin nógv. Onkuntíð eydnast hann væl, og aðrar ferðir eydnast hann minni væl. Róðrarteinurin á ólavsøku er stuttur, og vit hava neyvan ráð at missa so nógv, sum vit hava mist í startinum í undanfarnu kappingunum. Gongurólvur hevur enn ikki hildið allan teinin, men tá teinurin er so stuttur í Havnini, so má møguleikin hjá honum at vinna mestast at vera betri, heldur formaðurin á Stráluni.

### Nógvir um boðið

Í fjør og í fyrraárið vann Eysturoyingur á ólavsøku. Í ár hevur ikki hilnast nakað serligt. Men í Vestmanna vóru ábendingar um, at gongd aftur er komin á Eysturoyingin, og teir hava hampuligar vónir undan ólavsøkuni.

Havnarbáturin er tornaður aftur, og hann tykist ikki hava tikið skaða av, at teir royndu at turka hann undan vestanstevnuni. Havnarbáturin liggur undir Molanum, har bara Vágbingur verður millum heimabátin og áskoðararnar. Tað verður mett sum fyrimunur at liggja tætt undir Molanum. Á ávísum ættum koma bátarnir undir Molanum skjótari á deyðavatn, og tað er altíð ein fyrimunur. Størsti fyrimunurin verður mettur at vera, at áskoðarafjøldin og rópini frá teimum lyfta manningina fram.

Men tað eru Nólsoyingur og Vestmenningur, sum kappast um FM heitið. Tann kappingin er púra opin. Teir liggja undir liðini á hvørjum øðrum, og tann teirra, sum kemur fyrri á mál, verður FM vinnari. Men tað telur ikki heilt so nógv, um tað ikki eydnast FM vinnaranum eisini at vinna á ólavsøku. Tí verður meiri enn alt lagt í, tá síðsti róðurin í hesum kapprórarárinum verður á skránni.

JH

# Jákup og teir taptu

*Meistaraliðið frá í fjør skoraði fimm minuttir undan leikloki sigursmálið móti meistaraliðnum frá í ár*

Tað hevur í nýggja kappingarárinum hilnast illa hjá Herfølge á heimavølli. Fyrst taptu teir 1–0 móti Viborg í dystinum millum meistaraliðið og steypavinnararnar, og tá teir mikukvøldið royndu seg í fyrsta landskappingardystinum, kiksaði tað aftur.

Knappliga tvey túsund áskoðarar vóru vitni til ein 1. hálvleik, sum í leikferð minti um summarfrítíðar fótbólt. Tá vóru eingi mál skorað, men í 2. hálvleiki komu aðrir bollar á suppuna.

Herfølge setti hol á, tá 2. hálvleikur var fimm minuttir gamal. Og so gekk skjótt. Tommy Schram var so óheppin, at hann gjørdi sjálvmál hjá Jákupi Mikkelsen, sum vardi málið allar 90 minuttirnar. Tá eitt stórt korter var eftir legði Søren Frederiksen AaB á odda. Tá var John Faxe Jensen akkurát farin av vøllinum. Avloysarin hjá honum var Micheal Thomsen, og hann hevði ikki verið leingi á vøllinum, tá hann javnaði til 2–2.

Fimm minuttir undan leikloki skoraði Thomas Augustinussen sigursmálið. Hann hevði bara verið nakrar fáar minuttir inni á AaB liðnum.

Hjá Herfølge var stórur saknur í Steven Lüstü, sum var leikbannaður. Á Stadion skemtaðu tey sær við, at dagsins maður í leikskránni var Jens Madsen, sum sambært skránni fyri stuttum hevði skrivað undir nýggjan trý ára sáttmála við Herfølge! Hann skrivaði í síðstu viku undir sáttmála við eitt grikskt felag. Enn hevur einki verið at hoyrt um, hvussu tað verður við fótbóltsframtíðini hjá Steven Lüstü, sum hevur verið settur í sambandi við fleiri feløg í eingilsku 1. deildini.

Herfølge skal sunnudagin spæla í Lyngby. FCK og Todi Jónsson skulu vitja í Århus. Óli Johannesen verður ikki á liðnum hjá AGF.

JH

# Fleiri manningar til Scilly

*Kapproður: Reglurnar siga, at tað skulu vera róðrarfólk, sum hava tikið lut í undanfarna kappingarárinum, ið skulu umboða føroyskan kapproður*

Seinnapartin í dag verður greitt, hvørjar manningar komandi ár skulu umboða Føroyar á Scilly oyggjunum. Uppløgdu favorittarnir eru Argjabáturin og genturnar umborð á Frúnni. Men í Róðrarsambandinum vísa tey á ta greinina í reglunum, sum sigur, at tey, sum fara avstað, skulu hava róð í undanfarna kappingarári.

Hetta vil við øðrum orðum siga, at um Frúgvin og Argjabáturin eru eins sannførandi í dag, sum tey hava verið í hinum fimm róðrunum, so skulu tað vera manningarnar, sum hava róð í ár, ið fara av landinum.

Tað er væl hugsandi, at onkur, sum hevur róð í ár, ikki fer at rógva komandi ár, kanska tí tey vera burtur í arbeiðsørdinum ella lestrarørindum:

– Um tað verður soleiðis, so siga reglarnir, at fólk skal biðjast av tí bátinum, sum endar næstbest í kappingini. Um vit taka kvinnukappingina sum dømi, so vil hetta siga, at um Frúgvin vinnur kappingina í dag, og Jarnbardur við kvinnum verður næstfremst, og ikki allar á Frúnni kunnu fara niður á Scilly oyggjarnar, so skulu teir biðja fólk av Jarnbardi. Manningarnar hava langt síðani fingið asetingarnar, og vit hava mint tær manningarnar, sum liggja best fyri í kappingini á hetta, sigur Hannis Joensen, formaður í Róðrarsambandinum.

Nógv gull og skreyt verður handað á Bursatanga í dag. Tryggingarfelagið Føroyar letur ognarstey til allar FM vinnararnar. Heiðurskrónur til tríggjar teir fremstu í kappingini millum 10–mannaførini eru latnar av Ísbjørn, sum Bjarti Mohr eigur. Heiðurskrónurnar til 8–mannaførini eru latnar av pf. Sveipi, sum hevur flamingoverksmiðju á Argjum. Tórshavnar Maskinverkstaður letur heiðurskrónurnar til 6–mannaførini við monnum, Føroya Sparikassi letur heiðursmerkini til kvinnurnar við 6–mannaførum, og Føroya Banki letur til 5–mannaførini við dreingjum og gentum.

JH

# Nýtt rumenskt par til VÍF

*Eftir øllum at døma er eitt annað rumenskt hondbóltspar nú á veg til VÍF*

HEINI Í SKORINI

Fyri tveimum árum síðani kom eitt rumenskt hondbóltspar til Vestmanna at leika við VÍF, og ikki kann sigast annað, enn at tað hevur verið ein styrkur fyri hondbóltin í Vestmanna at havt tey bæði Daniel og Ioanu Rapa.

Nú er eftir øllum at døma eitt rumenskt par afturat á veg til Vestmanna, og ætla tey eisini at leika við VÍF. Daniel og Ioana hava júst verið og ferðast heima í Rumenia, og har eru tey so komin í samband við parið, sum er sinnað at koma til Føroya at spæla hondbólt.

Daniel hevur fyrr leikt á liði við hesum rumenanum í Rumenia, og eftir hansara tykki kann hann væl og virðiliga brúkast í føroysku 1. deild. Harafturímóti vita teir í VÍF ikki so nógv um konu hansara, uttan tað at hon er málverji.

Hjalmar Klein Olsen, venjari hjá VÍF, sigur, at lítið væntar á hjá teimum báðum at koma.

-Seinast eg hoyrdi, var bert eftir at finna bústað til rumenska parið, og eftir tað skuldi alt verið komið upp á pláss, ljóðar tað frá VÍF venjaranum.

Spurdur, um sáttmálar verða skrivaðir, sigur Hjalmar, at tað heldur hann ikki.

-Eg vænti ikki, at vit fara at skriva sáttmála við tey. Felagið hevur sum so ikki nakrar útreiðslur av teimum, uttan tað at vit hjálpa teimum við arbeiði og bústaði, endar Hjalmar við at siga.

Seinastu ferð eitt rumenskt par kom til Vestmanna, var tað ein veruligur styrkur fyri hondbóltin í bygdini, har bæði Daniel og Ioana hava sett síni spor sum ávikavist venjari og leikari. Ioana hevur nevniliga verið millum allarbestu kvinnuligu hondbóltsleikarar í landinum, síðani hon kom, og hóast Daniel næstan ikki hevur kunnað spælt vegna skaðar, hevur hann víst sera góð evnir sum venjari.

So, um nýggja rumenska parið verður ein eins góður fongur og seinstu ferð, verða Vestmenningar drúgvir komandi kappingarár.

Mansliðið hjá VÍF var sera nær við at vinna FM í ár, og kanska ein rumeni afturat kann vera tað, sum fær VÍF aftur á ovastu rók í føroyskum manshondbólti.